











# Í fótasporum Che

**Í verkum sínum skrivaði argentinska fólkahetjan Ernesto Guevara (vanliga nevndur "el Che"), at kollveltingarligi íblástur hansara stavaði frá longu ferðum hansara kring Suðuramerika. Tá ið eg sjálv ferðist úr vesturlendsku londunum Argentina og Kili og upp ígjøgnum fátækastu londini í Suðuramerika, Bolivia og Peru, skilji eg hugsanirnar hjá tí kenda Che. Ber tað til ikki at fáa hug at kollvelta heimin á einari ferð sum hesari?**

## Samrøða



**Annika Hedegaard Isfeldt**

**Hetta er annar partur úr ferðafrágreiðingini**

Frá vesturlendsku metropolunum Buenos Aires og Córdoba í stórum bussum, man ikki sær í Evropa, til niðurslitnar bumlibussar í Bolivia. Nú eg eri komin yvir hinumegin kilensk/boliviansku grensuna byrjar alt at líkjast meira teimum nógvu søgunum, man hevur hoyrt um Suðuramerika. Her er tann harði veruleikin. Tað er her, man verður frámældur einsamallur at fara sum ljóshærdur turistur...

### La Paz, Bolivia, mikudagur 11. mars 2009

*BANG!*

Eg hoyri eitt buldur aftan fyri meg. Síðani fleiri skot. Eg ivist onga løtu í, at tey stava frá nógvu vápnaðu politistunum, eg júst eri farin framvið. Eg tori ikki at snara mær á; hvat hendir, um tey síggja, at eg standi her og eygleiði teir? Eg seti ferðina upp. Tori ei heldur at renna. Gangi bara skjótt, so skjótt, sum beinini klára at bera meg.

Líka so knappliga sum skotini byrjaðu, líka so skjótt steðga tey aftur og La Paz verður aftur friðarligur. T.v.s. so friðarligur sum governmentali høvuðsstaðurin í fátækasta landinum í Suðuramerika kann verða. Dagurin er skjótt av og eg royni at fáa nervarnar at slappa av við at keypa mær ein stóran kúluís og seta meg ímillum nógvu bolivianararnar á plássinum uttan fyri stóru glæsiligu húsunum hjá forsetanum í Bolivia, Evo Morales. Eftir nakrar minuttir byrji eg aftur at hugsa meiri rationelt; tankarnir verða minni kaotiskir; eg spyrji meg sjálva, hvat tað var, sum júst hendi. Hetta fari eg undir ongum umstøðum at fortelja fyri nøkrum har heima. Ikki fyrr enn at eg eri komin heim í øllum góðum. Tað var jú heldur ikki ætlanin at fara til óróliga partin av Bolivia, bardagin í La Paz átti at verið av fyri fleiri mánaðum síðani.

Eftir at Bolivia misti strond sína til Kili í einum bardaga fyri nógvum árum síðani, er alt byrjað at ganga niður á hondina fyri gamla inkararíkið. Kilenarar kunnu framvegis næstan ikki ferðast runt í Bolivia uttan at skula halda tjóðskap teirra loyniligan; at missa einasta vegin til havið og havríkidømið er ikki júst nakað, bolivianararnir fara at fyrigeva teimum innan næstu mongu árini.

Í dag er Bolivia fátækasta landið í Suðuramerika og hetta sigur ikki heilt lítið. 64% av íbúgvum Bolivias liva í ekstremum fátækradømi; hesir liva fyri undir ein dollara um dagin; stættarmunirnir eru stórir; leingi hevur alt sæð svart út hjá fátøku bóndunum. Á flestu stóru garðunum kring Bolivia arbeiða upprunaindiánarar sum skuldstrælir, har stórur partur av løn teirra fer til at gjalda skuld, teir hava arvað frá foreldrum og eldri ættarliðum. Yvirklassin, harafturímóti, livir eina luksuriøsa tilveru, ið líkist tilveruni hjá einum vælhavandi vesturlendingi.

Men, sum søgan hevur lært okkum, kann hetta ikki halda áfram í allar ævir. Ein tíð kemur, tá ið tey fátæku sláa seg saman og gera uppreistur. Fyri Bolivia hendi hetta í 2006, tá ið nýggi forseti Bolivias, Evo Morales, varð valdur sum fyrsti forseti við indiánskan uppruna nakrantíð. Morales varð vónin, øll høvdu bíðað eftir í so mong ár. Hann var fyrsti maður, ið tordi at fara undir eitt stríð ímóti ríku bóndunum. Hjartamál hansara eru at minka um stættarmunirnir í Bolivia og harvið vónandi eisini skapa eitt betri samfelag fyri øll. Tað er tó ikki altíð lætt at stríðast ímóti yvirklassanum, sum hevur átt allar ognir landsins, so leingi man kann minnast. Í fleiri mánaðir varð man frámæltur at ferðast inn í Bolivia, tí bardagarnir í landsynningspartinum, har meginparturin av yvirklassanum býr, gingu so hart fyri seg. Nú átti tað at verið meira friðaligt í økinum...

Nervarnir hava tað betur nú og eg haldi, at eg havi fingið dirvi til at fara heim aftur til hostellið at leggja meg, hóast klokkan enn ikki er vorðin átta. Eg hevði fyrsta bolivianska busstúr mín í nátt norður til La Paz úr Uyuni; tað var ein uppliving. Eftir at hava goldið ein feitan yvirprís fyri bussin (tað var sjálvandi ikki sami bussurin, sum reklamerað var fyri á myndini, tá ið eg keypti billettina, sum tann bussurin eg skuldi avstað við), hevði eg ein langan bumlitúr fyri framman við einari svøvnleysari nátt, har vit fleiri ferðir noyddust at fara úr bussinum fyri at hjálpa til við at skumpa hann upp úr móru, og har mánin og stjørnurnar vóru einastu ljósini á staðnum – júst sum í filmunum. Tað fyrsta, eg sá, tá ið eg í morgun kom til hostellið í La Paz, var eisini, at tey strangliga frámæla fólki at fara við bussi suðureftir til Uyuni vegna veður. Nice!

### Copacabana, hósdagur 12. mars 2009

Tá ið eg í 2007 var íðin studentaskúlanæmingur, brúkti eg meginpartin av frítíð mínari til at arbeiða hart við at útbreiða kunnleikan um studentahjálparf elagsskapin Operatión Dagsverk og táverandi verkætlan hjá felagsskapinum í La Paz partinum av Bolivia. Eftir óteljandi greinar, útvarpssamrøður og fyrilestrar kendist tað næstan eins og, at eg sjálv hevði verið í La Paz og sæð

Sosialurin